# ítróttur

Nr. 27 • fríggjadagur • 8. februar 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

Kyndil – StÍF 23-24 (12-11)

## StÍF snýtti Kyndil

**Artur Johansen skeyt vinnandi málið tvey sekund fyri leiklok, eftir at Kyndil júst hevði javnað. Spenningurin var í hæddini gjøgnum allan dystin, tá Kyndil tók ímóti steypavinnarunum av Strondum**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Strandingar megnaðu at halda støðið eftir ta hørðu steypafinaluna leygardagin móti Neistanum. Við einum máli eydnaðist tað at vinna á hinum havnarliðnum, Kyndli, í høllini á Hálsi mikukvøldið.

Við sigrinum liggur StÍF einsamalt á triðja plássi, og bronsumerkini eru í hondum. Tó hava strandingar framvegis ein møguleika at vinna silvurmerkini frá Neistanum, um alt gongur eftir vild. Munurin upp til VÍF er tó ov stórur at vinna innaftur.



*StÍF vann tepurt á Kyndli mikukvøldið. Her hevur verjan gott tak á Janus Einari*

### Spenningur fyri allar pengarnar

Dysturin mikukvøldið var sera spennandi, og áskoðarin fekk valuta fyri pengarnar. Liðini at kalla fylgdust gjøgnum allan dystin, og ongantíð var annað liðið langt frammanfyri.

Kyndil hevði munin fyri steðgin. Serliga var Bárður Johannesen sera væl upplagdur. Hann gjørdi ikki færri enn sjey mál á rað ta einu løtuna í fyrra hálvleiki. Kyndil var frammanfyri allan hálvleikin, men ongantíð var munurin fleiri enn trý mál.

Saman við Bárði Johannesen spældi málverjin Jóhan Danielsen ein framúr góðan fyrra hálvleik. Hann møtti hetta kvøldið sínum gomlu liðfeløgum, sum hann hevur vunnið bæði steypafinalu og føroyameistaraheitið við.

Hann tók eini brotskøst og bjargaði annars fleiri góðum royndum í fyrra hálvleiki. Ein bjarging skaraði framúr. Costin Dumitrescu tekur brotskast, sum Jóhan tekur, men rumenin fangar bóltin aftur. Hann blakar seg inn í málteigin, men enn einaferð tekur Jóhan skotið.

Ikki kann sigast annað, enn at Kyndil hevði yvirvág og gott tak á StÍF hesa løtuna. Venjarin hjá StÍF kendi seg tá noyddan at taka eitt leikbrá (time out).

Hetta tóktist at hjálpa nakað uppá avrikið hjá strandingum. Teir fóru spakuliga at ota seg innaftur á kyndlamenn, og við steðgin var bara eitt mál á muni.

Fyrri hálvleikur var eisini merktur av fleiri býttum mistøkum. Leikarar missa bóltin uttan at verða trýstir ella. Eitt nú misti StÍF bóltin í tveimum álopum á rað fyri at gera ov nógv fet.

### StÍF fer framum

Ikki gekk long tíð eftir steðgin, fyrr enn StÍF hevði lagt seg framum, og Kyndil megnaði ongantíð at leggja seg framumaftur.

Munurin var ongantíð tann stóri, og Kyndil megnaði onkuntíð at javna, men so fór StÍF frá heimaliðnum aftur.

Dysturin var eisini sera hart spældur til tíðir. Tilsamans tólv útvísingar fullu, har StÍF fekk heilar átta av teimum.

Tá sjey minuttir vóru eftir at spæla hevði StÍF eina leiðslu á tvey mál. Men síðani fingu strandingar tríggjar útvísingar innanfyri tríggjar minuttir, so teir spældu við fýra útileikarum. Hetta gav Kyndli møguleikan at javna.

Regin Johannesen, bróðir Bárð, leyp inn frá vonginum og javnaði til 23-23, tá bert tíggju sekund vóru eftir at spæla.

Men steypavinnararnir gjørdu skjótt av. Bólturin varð tveittur niðan á miðjuna, har Marius Joensen setir beina kós móti málinum. Úti á vonginum er Artur Johansen púra leysur Garvaði toppskjúttin hjá StÍF tveitir seg inn, og elegant lyftir hann bóltin uppum gamla liðfelagan Jóhan Danielsen.

Vinnandi málið varð skotið tvey sekund fyri leiklok, og StÍF vann dystin við einum máli. Spenningur til seinasta sekund.

Eitt reytt kort fall í dystinum, og tað varð givið eftir leiklok. Rúni Mohr, ið var á útskiftingarbeinkinum hjá Kyndli, var í øðini inn á dómararnar fyri onkra ávísa avgerð í dystinum. Hann gav dómaranum Sophusi Dal-Christiansen av grovfílini, og hetta fekk hann reyða kortið fyri.

StÍF-arar vóru ovurfegnir um sigurin, og nú eru bronsukrónurnar at kalla tryggar. Hesin dysturin er kanska rættiliga eyðkendur fyri Kyndil í ár. Teir høvdu møguleikarnar at vinna ella fáa javnleik, og teir lótu enntá eitt mál inn í seinasta sekundi.

Kyndil er framvegis næstaftast, men vandin fyri niðurflyting er ikki serliga stórur.



*Eftir sigurin í steypafinaluni megnaðu Marius Joensen og hinir at halda støðið*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Dysturin í tølum:**
**Kyndil:** Bárður Johannesen 11(2), Høgni Klein 6(2), Regin Johannesen 4, Janus Einar Sørensen 1
**StÍF:** Artur Johansen 6(2), Costin Dumitrescu 5, Sveinur Justinussen 3(1), Marius Joensen 3, Bent Djurhuus 2, Jón Rasmussen 1
**Brotskøst:** Kyndil 5, StÍF 4
**Útvísingar:** Kyndil 4, StÍF 8
**Reyð kort:** Kyndil 1
**Dómarar:** Kristjan Johannesen og Sophus Dal-Christiansen





# Christian Høgni gjørt sáttmála við Vejle

**Mikudagin skrivaðu Christian Høgni Jacobsen og danska felagið Vejle undir ein sáttmála. 21 ára gamli áleyparin úr Runavík er nú fulltíðar yrkisleikari**

FÓTBÓLTUR
*Stefan í Skorini*



*Christian Høgni Jacobsen fer framyvir at spæla í reyðu troyggjuni hjá Vejle. Hann hevur gjørt sáttmála við danska superligafelagið, har hann eftir øllum at døma verður fastur áleypari*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Stórtíðindi eru at frætta frá runavíkinginum Christian Høgna Jacobsen, sum hevur royndarvant við Velja seinastu tíðina. Hann skrivaði mikudagin undir ein sáttmála við superligafelagið Vejle.

Eftir at hava vant og spælt við Esbjerg, ið er grannafelag hjá Velje, í eitt hálvt ár, hevur ungi áleyparin gjørt sáttmála við Vejle. Sáttmálaskeiðið erí tvey og eitt hálvt ár. Hetta er ein fulltíðar sáttmáli, sum gevur Christiani Høgna møguleikan at halga seg fótbóltinum burturav.

Líkt er til at Christian Høgni verður fastur áleypari í Vejle. Frammanundan eru fimm áleyparar í hópinum, men hesir hava bara skotið seks mál tilsamans sínámillum í hesum kappingarárinum. Hetta gevur føroyinginum møguleika at fáa spælitíð.

Tað var fyrst Keld Bordinggaard, ið sýndi fyrrverandi NSÍ-aranum áhuga, tá hann var í Esbjerg. Nú skal Keld vera hjálparvenjari á danska landsliðnum, og tí hevur hjálparvenjarin Frank Petersen tikið yvir í Vejle.

Vejle hevði fylgt Christiani Høgna eina tíð, men vildi ikki fara eftir honum, meðan hann var í Esbjerg.

Sáttmálin er komin í lag ígjøgnum NAFA, North Atlantic Football Agency, og tað er Jákup í Stórustovu, ið hevur umboðað leikaran í samráðingunum.

– Vit eru sera væl nøgdir við samráðingarnar og við úrslitið, sum spurdist burturúr, sigur Jákup í Stórustovu. Umframt sáttmálan hjá Christiani Høgna hevur Jákup fingið eina samstarvsavtalu í lag við Vejle. Hetta hevur við sær, at nakrir ungir føroyskir leikarar sleppa at royna seg í felagnum.

### Ikki nøktandi tilboð og umstøður frá Esbjerg

Sosialurin skilur, at tilboðið frá Esbjerg als ikki var nøktandi, og tí kom Vejle uppí leikin.

Tá Christian Høgni fór niður, var tað ikki sum partur av nakrari avtalu, men hann flutti niður við gentu sínari. Hann setti seg síðani í samband við Esbjerg, har hann var við í hópinum og fekk nakrar minuttir á vøllinum.

Tað kann vera, at Esbjerg hevur tikið Christian Høgna fyri givið, og tí bjóðaði felagið honum ikki nakran góðan sáttmála.

Síðani vendi leikarin sær til Jákup í Stórustovu, sum skuldi hjálpa honum at fáa ein sáttmála. Hetta hevur nú eydnast.

– Tað er gott at fáa føroyskar leikarar útum landoddarnar, og Superligain er gott støði hjá einum ungum leikara, sigur Jákup í Stórustovu.

Christian Høgni hevur spælt tríggjar venjingardystir við Vejle, og hann hevur skotið eitt mál, umframt at hann hevur lagt upp til nøkur.

Nú er hann farin til Kypros á venjingarlegu við landsliðnum. Har fer hann eftir ætlan at vera við móti Póllandi og Liktinstein, áðrenn hann leggur leiðina til Spania. Har er Vejle á venjingarlegu, og liðið skal spæla nakrar venjingardystir.

NSÍ fær eisini nakað burturúr hesum sáttmálanum, tí Vejle hevur keypt Christian Høgna frá NSÍ. NSÍ lænti fyrst Esbjerg spæliloyvi, men leikarin varð ongantíð keyptur leysur av sáttmálanum.

– Tað er umráðandi, at tey føroysku feløgini eisini fáa nakað burturúr, tá spælarar skifta feløg, tí tað er kostnaðarmikið at reka eitt fótbóltsfelag í Føroyum, sigur Jákup í Stórustovu, sum fegnast um, at feløgini nú eru meira greið yvir, at tey kunnu fáa nakað burturúr ungum og evnaríkum leikarum.

Tað er fyrrverandi danski landsliðsleikarin John Sivebæk, ið hevur umboðað NSÍ í samráðingunum við Vejle.

Vejle liggur í løtuni á næstaftasta plássi, og fremsta uppgávan hjá Christiani Høgna verður at bjarga felagnum undan niðurflyting.

NAFA
FØROYA SPARIKASSI
kall
ATLANTIC AIRWAYS

Kyndil – StÍF 26-29 (10-16)

## StÍF lyfti seg av aftasta plássi



*Anna Maria Berthelsen úr StÍF skræðir seg leysa frá Palmu Petersen, ið áður hevur spælt við StÍF. Tað vóru kvinnurnar hjá StÍF, ið vunnu botnuppgerðina*

**Kvinnuliðið hjá StÍF vann mikukvøldið ein týðandi sigur á Kyndli. Við sigrinum fer StÍF av aftasta plássi og leggur bæði Sóljuna og Kyndil afturum seg**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

Verulig botnuppgerð var í høllini á Hálsi mikukvøldið. Tvey tey aftastu liðini brustu saman í einum sera spennandi dysti, sum hevur avgerandi týdning fyri, hvør flytur niður.

Tað vóru gestirnir, ið drógu longra stráið, tá samanumkom. StÍF vann dystin tepurt við trimum málum. Tó var útiliðið frammanfyri gjøgnum allan dystin.

### Sannførandi byrjan

StÍF fekk eina betri byrjan enn Kyndil, og beinanvegin var greitt, at heimaliðið fór at vera kroyst gjøgnum dystin. StÍF sýndi betri spæl fyri steðgin og strandingar vóru kaldari frammanfyri málinum enn Kyndil.

StÍF førdi við seks málum við steðgin, og fáur mundi vænta ein spennandi enda.

Seks mál vóru á muni, tá byrjað varð aftur, men StÍF økti skjótt upp í átta mál. StÍF hevði nú sera góð kort í hondini, men uppflytararnir vóru nær við at tveita sigurin burtur móti endanum.

Hóast munurin var stórur høvdu kyndilskvinnur á ongan hátt góðtikið eitt tap. Tær fóru at kempa og vunnu seg inn á StÍF í stórum fetum.

Í fýra minuttir fekk Kyndil seks mál, meðan StÍF ikki fekk bóltin í netið. Nú var tað bara eitt mál, ið skilti liðini. Kyndil hevði nú ein møguleika at venda dystinum á høvdið, men StÍF dróg sigurin í land seinastu løtuna av dystinum.

Sunfríð Jacobsen sló sigurin fastan við tveimum málum í seinastu minuttunum.

**Dysturin í tølum**
Kyndil – StÍF 26-29 (10-16)
**Kyndil:** Lotte K. Sørensen 10(3), Annika Ljósstein 7, Marjun Tróndarson 3, Ann Hansen 3, Palma Petersen 1, Anja Johannesen 1, Ann-Mari Wang 1
**StÍF:** Ileana Manulescu 9(1), Alina Olaru 8(1), Anna B. Danielsen 5, Sunfríð Jacobsen 3, Poula D. Olsen 2, Anna Maria Berthelsen 2
**Brotskøst:** Kyndil 3, StÍF 2
**Útvísingar:** Kyndil 1, StÍF 3
**Dómarar:** Kristjan Johannesen og Ragnar Simonsen.

## Landsliðshópurin

Landsliðið hjá monnum í fótbólti fór mikudagin á venjingarlegu á Kypros. Av tí at fleiri leikarar hava givið avboð og nýggir eru komnir ístaðin prenta vit her leikarahópin í heilum líki

**Málverjar:** Jens Martin Knudsen (NSÍ) og Meinhard Joensen (KÍ)

**Verjuleikarar:** Pól Thorsteinsson (VB), Jón Rói Jacobsen (HB), Jóhannus Joensen (HB), Arnbjørn Danielsen (NSÍ), Bartal Eliassen (GÍ)

**Miðvallarar:** Palli Augustinussen (VB), Rógvi Jacobsen (HB), Jákup á Borg (B36), John Petersen (B36), Heðin á Lakjuni (KÍ), Klæmint Matras (B36), Sámal Joensen (GÍ)

**Álop:** Uni Arge (HB), Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Andrew av Fløtum (HB) og Hjalgrím Eltør (KÍ)